

# Alirisin í Suðuroy hevur reist seg

**ALING** P/F Faroe Farming, stóra alifyritøkan í Suðuroy, hevði 50 mió kr í avlopi í fjør áðrenn skatt. Hetta er fimm ferðir størri enn árið fyri

Eirikur Lindenskov

Tað hevur gingið stútt og støðugt framá hjá stóru alifyritøkuni í Suðuroynni tey seinastu fimm árini. Business-Line skrivar á www.bl.fo, at Faroe Farming, við heimstaði í Vági, er í dag eitt framkomið alifelag við framleiðslu á landi og sjógvi. Felagið hevur egið kryvjivirki og hevur í árinum keypt fiskavirkið havnarlagnum í Vági til hetta endamál.

Góðir prísir á aldum laksi á heimsmarknaðinum í fjør og ein væl skipað framleiðsla geva nú sjónlig úrslit á botnlinjuni hjá Faroe Farming.

Verður hugt í roknskaparnar tey seinastu fimm árini sæst ein støðug framgongd, har 2010 tó er nógv tað besta í søgu felagsins.

Faroe Farming hevði í fjør eitt avlop upp á 50 milliónir krónur áðrenn skatt. Hetta er fimm ferðir størri enn undanfarna ár. Eginpeningurin er eftir einum árið tvífaldaður og er við ársenda 2010 komin upp á slakar 88 milliónir krónur.

Felagið rindaði 6,55 milliónir krónur í skatti í fjør, og verður nettoavlopið sostatt góðar 43,5 milliónir krónur.

Í miðal starvaðust 53 fólk hjá Faroe Farming í fjør.

Stjóri í Faroe Farming er Erhard Joensen.

# SMS keypt Miðlon

**VINNA** Handilshúsið Miðlon í Havn fekk um vikuskiftið nýggjar eigarar. Saman við 3'aranum og Skousen hevur SMS keypt handilshúsið Miðlon í Havn

Eirikur Lindenskov

Niels Mortensen, stjóri í SMS, sigur, at SMS hevur keypt 50 prosent, meðan hini feløgini tilsamans hava keypt hin helmingin. SMS eigur helmingin av 3'aranum, og Niels Mortensen eigur persónliga helmingin av Skousen.

Tað er nærliggjandi at hugsa sær, at handlarnir hjá Skousen og eitt nú Bónus, sum hevur til húsa hjá Posta hinu megin vegin, flyta inn í bygningin. Men hetta vil Niels Mortensen ikki siga nakað um.

– Alt hetta er so nýtt enn, at vit fáa einki sagt um tað, sigur Niels Mortensen.

Mads A. Winther, stjóri í Miðlon sigur, at tey fingu eitt gott boð, og tí varð avgjørt at selja.

– Nú P/F SMS kom við einum góðum boð upp á bygningin, so tóku vit av, sigur Mads A. Winther, stjóri í Miðlon.

Hann sigur, at bæði seljari og keypari eru nøgdir við handilin, sum varð avgreiddur í hóskvøldið.

Tað var P/F Miðlon hjá Mads A. Winther, sum í 2006 bygdi bygningin, sum hýsir handlunum »Elding«, »Rúsdrekkasøluni«, »Snák«, »Norðoya Sparikassa«, »Nomi Smykkur og Ur og Profil Optik Niels L. Arge«, »Íblástur« og »Køksmiðstøðini«.

Enn vil Mads A. Winther einki siga um, hvussu tað verður við stóra handilinum hjá honum, »Elding«. Men sum skilst flytir hann úr bygninginum.




